# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Dreymabyrjan

**Um vikuskiftið varð nýtt fjepparafelag sett á stovn. Hesaferð var tað kenda enska stórfelagið, Manchester United, ið átti tørn at fáa eina føroyska deild av einum fjepparafelagi, og timingin kundi ikki verið betur**




*Rómurin var í hásæti, tá United skoraðu móti Liverpool, og loftið á Rex hevði hug at lyfta seg upp frá*

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið valdu menn at samla fólk uppi á Rex, har stórdysturin millum Liverpool og Manchester United skuldi vísast á stórskíggja. Í hesum sambandi høvdu hesir somu menn valt at seta á stovn eitt fjepparafelag, og fitt av fólki var uppmøtt.

Tiltakið var vælvitjað, og frøin var alstór á monnum, tá United í 43. minutti løgdu seg á odda.

## Í kjalavørrinum á hinum

Felagið hevur verið longi ávegis, og fleiri hava verið við til at lagt lunnar undir hetta felag, ið nú hevur sæð dagsins ljós.

At stovna fjepparafeløg er ikki nakað nýtt fyribrigdi í Føroyum, og eru tað longu fleiri feløg ið eru sett á stovn í Føroyum, ið stuðla enskum fótbóltsfeløgum. Herfyri varð Newcastle fjepparafelag sett á stovn, og Liverpool og Arsenal hava verið í eina tíð longu.

Hesi fjepparafeløg hava verið rímuliga virkin, við at fyriskipa túrum til dystir í Onglandi, og annars tiltøkum heima í Føroyum, har fjepparar møtast og hugna sær.

## Minniligur dagur

Avtalað var at møtast klokkan 11:45 á dansistaðnum Rex í Havn, har tveir stórskíggjar vóru settir upp at vísa dystin millum arvafíggindarnar Liverpool og Manchester United, og 120 fólk valdu at møta upp. T-skjúrtur vóru til keyps, til minnis um tiltakið, og okkurt var at sløkkja sær tostan við eisini. Sagt verður frá fyriskiparunum, at um ikki fleiri jólaborðhald vóru, komu kanska enn fleiri fólk niðan á Rex.

Tiltakið var sera væl eydnað, og fleiri tílík tiltøk eru í væntu hoyrist frá fyriskiparunum.

## Endamálið

Limirnir møtast til allar stórdystir. Dystir ímóti Chelsea, Liverpool og Arsenal. Umframt møguligar finalur!

Heimasíða fer at virka frá januar-mánað. Øll kunning skal vera frá heimasíðuni. Kjakforum verður.

Arbeitt verður fyri at fáa viðurkenning frá Manchester United FC.

Felagið ætlar at samstarva við onnur fjepparafeløg um leigitúrar niður til Onglands.

Miðað verður eftir at skipa fyri 3-4 túrum til Old Trafford.

Ætlanin er eisini 1-2 ferðir í hvørjum kappingarári at skipa fyri barna- og ungdómstiltaki við ísi og sodavatn, sum skal verða roykfrítt!

Vónin er eisini at fáa fótbóltskappingar í lag. Bæði innanhýsis, og ímóti hinum fjepparafeløgunum í Føroyum.

## FAKTA

**Nevndin varð vald, og fer hon at skipa seg í næstum**

Birnir Haukson
Heri Simonsen
Jón Brian Hvidfeldt
Jan Poulsen
Jóannes Egholm

Undirnevndir verða fullmannaðar fyrsta dagin.
Ferðanevnd/Heimasíðunevnd

Limagjald varð ásett til at vera 250,- kr. um árið.

# Kaka er heimsins besti

**Ikki heilt óvæntað bleiv brasilski Kaka kosin heimsins besti fótbóltsleikari av FIFA í gjárkvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Kaka varð í gjárkvøldið kosin heimsins besti fótbóltsleikari fyri kappingarárið 2007. Hansara framúrskarandi avrik á framrættaða miðvøllinum hjá AC Milan, har hann í ár eisini hevur vunnið Champions League og HM fyri lið, vóru ikki til at koma uttan um hjá Lionel Messi og Cristiano Ronaldo, sum annars vóru hinir báðir tilnevndu. Messi varð kosin næstbestur, meðan Ronaldo mátti taka til takkar við triðja plássinum.

25 ára gamli Kaka kom til AC Milan frá felagnum Sao Paolo úr heimlandinum Brazil, í 2003, og tá kostaði hann italska stórfelagnum bert 45 milliónir krónur.

## Hvør er Kaka?

Ricardo Izecson dos Santos Leite, hetta er rætta navnið á Kaka, og hann byrjaði at spæla fótbólt tá hann var átta ára gamal. Tá hann, í 2001, sum 15 ára gamal fekk sín fyrsta sáttmála tók hann av alt fyri eitt, og vísti stórspæl á hvørjum ári. Fyrsta árið skoraði hann 12 mál í 27 dystum og árið eftir skoraði hann 10 mál í 22 dystum. Hetta fekk skjótt tey stóru feløgini í Europa at lata eyguni upp fyri hesum brasilska fótbóltsúrmælinginum, og í 2003 fekk Milan fyri á leið 45 milliónir krónur, kløndnar í miðvallaran, og hetta er neyvan nakað teir fara at irða seg um.

Kaka er 25 ára gamal og hann hevur longu fingið 54 landsdystir og í hesum dystum hevur hann megnað at skora heili 19 ferðir. Nýggju mál fleiri enn okkara Rógvi Jacobsen.

